## 281 nyttuleysar milliónir

Í Madrid iðra tey seg um, at tað ikki eydnast at vinna kappingina um vertsskapni fyri Olympisku leikunum í 2016. Og minni verður iðranin ikki av, at kampagnan hjá býnum kostaði 281 milliónir. Peningur, sum tó ikki er mistur heilt sambært borgarstjóranum, Alberto Ruiz-Gallardon. Í 2011 gera vit av, um vit ætla at royna at fáa fatur á leikunum í 2020. Og eg eri púrasta vísur í, at Madrid fyrr ella seinni verður vertur, sigur borgarstjórin.



## Oyl-uppskotið tikið aftur

Sjálvsstýrisflokkurin tók í gjár uppskotið um serstakan føroyskan oyggjaleikagrunn aftur. Eftir at fíggjarnevndin hjá løgtinginum hevði vent tummilin niðureftir, helt Sjálvsstýrisflokurin, at tað vildi skapt meira skaða enn gagn, um uppskotið varð viðgjørt á tingið fyri síðani at fella. Og tí varð at enda valt at taka uppskotið heilt aftur í hesum umfarinum.

# Tit eru størri enn Inter

**Italska stórfelagið hevur vitjað í býnum Tréguier, har føroyska ferðalagið heldur til, men tað var bara eitt felag. – Tit eru eitt landslið og tað er størri, sigur borgarstjórin Michel Sohier**




Rólant Waag Dam



Michel Sohier, borgarstjórin í Tréguier, handar Brian Kerr, landsliðsvenjara, eina gávu
Mynd: Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Í býnum Tréguier búgva ikki 3000 fólk. Tískil er tað ógvuliga sjáldan, at býurin hevur forkunnuga vitjan. Men stórfelagið í Italia, sum hevur vunnið Seriu A trý ár á rað, hevur vitjað her fyrr. Tað var stórt, men vitjanin úr Føroyum er størri.

– Tá eg prátaði við borgarstjóran segði hann mær, at nú eitt landslið vitjaði, so var tað upp aftur størri, sigur Høgni í Stórustovu, forseti í Fótbólssambandi Føroya, sum saman við øðrum føroyskum umboðum vitjaði á Ráðhúsinum hjá Michel Sohier, borgarstjóra, seinnapartin í hósdagin.

– Hesa virðing vilja vit sjálvandi vísa honum, sigur Høgni í Stórustovu, sum umframt fleiri nevndarlimir, eisini hevði nakrar leikarar aftrat sær.

– Eitt er, at vit koma á vitjan, men tað er jú fótbólt tað snýr seg um og tað umboða leikararnir og venjarin best. Tí ynsktu vit eisini at hava onkrar av teimum við, og tað vóru tey ógvuliga fegin um, greiðir Høgni í Stórustovu frá.

Tað vóru tríggir av teimum fýra leikbannaðu, Símun Samuelsen, Einar Hansen og Christian Lamhauge Holst, ið vóru við á Ráðhúsinum.

### Ung og eldri fegnast

At fólkini í Tréguier eru fegin um, at hava so forkunnugu vitjan, sæst eisini á øllum brøgdum.

– Tey fegnast sjálvsagt eisini um, at dysturin verður spældur skamt frá teirra býi, og tað eru vit – uttan at tað er nakað, vit hava valt – orsøkin til, sigur Høgni í Stórustovu og sipar til, at stóru dystirnir hjá Frankaríki altíð verða spældir í teimum stóru býunum, men tá eitt lítið land sum Føroyar kemur, ber til at fara til smápláss at spæla.

Og á smáplássum sum hesum eru tey so mikið glað fyri vitjanina, at fleiri av føroysku leikarunum hava skrivað autografar – bæði til heilt ung og eisini heilt gomul fólk.

# Víkingarnir eru komnir

**»Víkingarnir eru komnir« Soleiðis ljóðaði ein av yvirskriftunum í eini lokalari avís í hósmorgunin, eftir at føroyska landsliðið kom til býin Tréguier í mikudagin**




Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Sum heild er áhugin fyri føroyska ferðalagnum ikki lítil. Eini 20 fjølmiðlafólk mundu vera til venjingina hósdagin, eins og fjølmiðlar eisini hava vitjað á hotellinum hjá føroysku leikarunum, og har føroysku fjølmiðlarnir búgva.

Tað eru bæði fjølmiðlafólk úr nærumhvørvinum, men eisini landsdekkandi fjølmiðlar, sum eru til staðar.

Landsliðsvenjarin, Brian Kerr, hevur sjálvsagt verið í fokus. Bæði skrivaðu og loftbornu miðlarnir hava verið eftir honum, men eisini nakrir av leikarunum eru áhugaverdir.

Ein afturvendandi spurningur frá fronsku fjølmiðlunum er nevniliga, hvørjir teir báðir einastu yrkisleikararnir hjá Føroyum eru. Teir hava nevniliga heft seg við, at Christian Lamhauge Holst spælir í Danmark og Símun Samuelsen í Íslandi, og eru tískil áhugaðir í at seta andlit á hesar báðar.

Av tí sama vóru tey á Ráðhúsinum eisini fegin um, at júst teir báðir taldust millum teirra, ið vitjaðu har í gjárkvøldið.


joueurs des Féroé ont pris leurs quartiers, hier, vers 19 h, à Tréguier.

Féroé.
Les Vikings ont débarqué !

Le Télégramme í Brest kallar føroysku leikararnar fyri víkingar